# »Best røkta bygd 2001«

TÍÐINDASKRIV

*Vegna stigtakarnar*
*Ferðaráð Føroya*
*Hjørdis Zachariassen*

Nú hava kommunurnar í Føroyum aftur møguleika fyri at luttaka í kappingini 'Best røkta bygd 2001.'

Áhugin fyri tiltakinum er stórur. Ferðaráðið, sum samskipar tiltakið, hevur fingið fleiri fyrispurningar frá kommunum, ið hava sýnt tiltakinum áhuga, og í hesum døgum hava tær fingið eitt kunnandi bræv og tilmeldingarskjal til kappingina 'Best røkta bygd 2001'

Ár um ár hava kommunur og áhugafeløg lagt stóra orku í at fríðka teirra øki, og skipað hevur verið fyri eitt nú ruddingardøgum. Fyri ferðavinnuna hevur hetta alstóran týdning, tá hugsað verður um, at ferðafólki kemur m.a. til Føroya fyri at uppliva okkara reinu og óspiltu náttúru.

Tiltakið er annaðhvørt ár, og varð fyrstu ferð fyriskipað í 1997, tá Sandavágur gjørdist vinnari. Tvey ár seinni var tað Eiði, sum fekk heiðurin 'Best røkta bygd 1999'.

Heitið og heiðurin 'Best røkta bygd 2001' fær tann bygdin, býurin ella býlingurin, sum hevur gjørt mest burturúr at skapa trivna og fríðka um umhvørvið. Reinførið er partur av hesum, men dentur verður t.d. eisini lagdur á, at økið er vælvirkandi fyri ferðafólki.

'Best røkta bygd 2001' fær eina virðisløn á kr. 30.000 frá Føroya Sparikassa. Eisini fær vinnarin eitt listarverk til minnis. Onnur og triðja virðisløn verða eisini latnar. Virðislønirnar skulu nýtast til eitthvørt, sum stuðlar endamálinum við kappingini - at eggja føroyingum til at hugsa um og virða umhvørvi, sið og mentan.

Vinnarin fær eins og undanfarnu árini eitt skelti, har teksturin verður 'Best røkta bygd 2001', 'Clean and Green award winner' — ein staðfesting av, at her búgva fólk, sum seta trivnaðin høgt.

Stigtakararnir, sum eru Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag (FNU), Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Ferðaráð Føroya, hava mannað eina dómsnevnd. Hesi eru Jacob Pauli Joensen, Gunnleyg Durhuus, Óli Mikkelsen, Osva Olsen og Per Hansen, sum um mánaðarskiftið mai/juni fara kring Føroyar at vitja og í felag finna 'Best røktu bygd 2001'.

Mikudagin 6. juni verður avdúkað á Listasavni Føroya, hvør fær heitið og heiðurin 'Best røkta bygd 2001'.


## Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum
er áhugvert hjá øðrum at vita,
eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin





Vilja tygum við
Í Býin
- hvønn hósdag

Ynskja tygum at lýsa í teiginum Í Býin, so fyllið út henda lepan og sendið hann til Sosialin, boks 76, FO-110 Tórshavn - ella Fax: 31 47 20

Tekstur



Kommunala Brennistøðin

Vandamikið burturkast

Í komandi viku, frá 7 maj, verða bláu posarnir til VANDAMIKIÐ BURTURKAST innsavnaðir í Tórshavnar kommunu

| OLJA: | LOYSINGAREVNI: |
| --- | --- |
| Øll sløg av olju, spillolja v.m. | Øll sløg av loysingarevnum: Terpentin, Bensin, Tynnari o.s.fr. |
| **MÁLING O.A.:** | **LJÓSKELDUR:** |
| Allar leivdir av máling, træverju v.m. | Ljósrør, Kyksilvurlampur, Lágorkuperur, Halogenperur |
| **BATTARÍ:** | **SÝRA OG LÚTUR:** |
| Øll sløg av battaríum og akkumolatorum | Øll sløg av sýru og lúti, Edikasýra, Saltsýra, Kaustisk soda o.s.fr. |
| **OYÐINGAREVNI:** | **ANNAÐ:** |
| Rottueitur, plantueitur, o.s.fr. | Blýggj frá eitt nú fiskireiðskapi, PVC-plast t.d. frá el-kaðalum, Kondensatorar frá ljósrørum, Fotoveskur, Heilivágur, Termometur |

Seti posan saman við ruskposanum vanliga avheintingardagin

HVØRVAN

www.team.fo







FILMSTEIGURIN

# Bring it on

Bring it on er ein ungdómsfilmur, ið snýr seg um tær so kallaðu »chearleaders«, sum umboða fótbóltsliðið The Toros.

Beint upp til meistaraheiti, sum tey ætla at vinna fyri 6. fer í rað, velur leiðarin at steðga sína succeríka karrieru. Hon verður avlýst av tí ambitiøsa Torrance, sum endiliga hevur fingið sín dreym uppfyltan.

Torrance bæði livur og andar fyri kóri, ið hon setur hægri enn nakað annað. Men dreymurin broytist skjøtt til eitt maridt, tá ið Torrance uppdagar at tann fyrrverandi leiðarin hevur stolið øll dansitrinini frá einum svartum hip-hop-heppikór. Hip-hop-heppikórið verður leitt av tí ambitiøsa Isis, ið hevur trupult við at skaffa sponsor, so tær kunnu verða





við meistaraheitsslutrunduna.

Torrance, ið roynir at lyfta kóri upp úr niðurtúrinum frá tí fyrverandi leiðarin, roynir at byggja ein nýggjan danseleik upp frá grundini. Hon fær hjálp frá tí nýinnfluttu Missy, ið hevur gott skil fyri dansi og eina skarpa tungu. Torrance og Missy royna nú at byggja heppikóri uppaftir, so tær eru klárar til meistaraheiti, har teirra mest royndu kappingarneytar eru The Clovers.





Frumsýning

| | | | | | |
| --- | --- | --- | --- | --- | --- |
| Fríggjadagin | 04.05. | kl. 19[00] | Fríggjadagin | 04.05. | kl. 21[15] |
| Fríggjadagin | 04.05. | kl. 24[00] | Leygardagin | 05.05. | kl. 19[00] |
| Leygardagin | 05.05. | kl. 21[15] | Leygardagin | 05.05. | kl. 24[00] |
| Sunnudagin | 06.05. | kl. 20[00] | | | |

www.in.fo/havnarbio

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




Frumsýning

Fríggjadagin 04.05. kl. 23[30] Leygardagin 05.05. kl. 23[30]
Sunnudagin 06.05. kl. 22[15]




Fríggjadagin 04.05. kl. 21[30] Leygardagin 05.05. kl. 21[30]
Sunnudagin 06.05. kl. 21[45]




Fríggjadagin 04.05. kl. 19[15] Leygardagin 05.05. kl. 19[15]
Sunnudagin 06.05. kl. 19[30]

KOMANDI FILMAR




Frumsýning
Fríggjadagin 11.05.




Frumsýning
Fríggjadagin 11.05.